almannaverkið

19-04-2023

# Umbøn um tilboð um at veita tænastur og ráðgeving innan Business Inteligence (Power BI)

**1. Inngangur**
Í samsvari við ásetingar um alment innkeyp, vil Almannaverkið hervið biðja um tilboð um at fáa ein samstarvsfelaga menna okkara BI umhvøvi.

**2. Bakgrund**
Almannaverkið er ein hornasteinur í føroyska vælferðarsamfelagnum. Almannaverkið hevur árliga samband við 16.000 føroyingar, sum fáa veiting ella tænastu. Hvønn mánað verða 18.000 peningaupphæddir fluttar til borgarar, og 650 borgarar fáa persónligan stuðul ella búgva hjá Almannaverkinum.
Almannaverkið er eitt av Føroya størstu arbeiðsplássum við 1.200 starvsfólkum.
Almannaverkinum tørvar ein veitara at hjálpa okkum við at greina okkara dátur umvegis Microsoft Power BI.
Almannaverkið hevur í løtuni trý mál, vit arbeiða við, fyri at betra okkara virksemi, og tey eru:

- Ein opin stovnur, sum ger tað einfalt fyri borgaran
- Betri bústaðir til fólk við serligum tørvi
- Hugsa skynsamt

Tað er serliga til okkara triðja mál "Hugsa skynsamt" sum ger at Almannaverkið hevur stóran tørv á greiða okkara dátur og tøl. Og tí tørvar okkum at fáa ein dugnaliga samstarvsfelaga at hjálpa okkum at koma á mál.

**3. Lýsing av veitingini**
Almannaverkið hevur í dag nógvar góðar skipanir til at gera sítt virksemi.

- Umvegis okkara Heildarskipan sum Almannaverkið hevur fingið Klintra at ment, verða allar veitingar útgoldnar, allar umsóknir svaraðar, alt tilknýti við Vangan og eisini verður øll journalføring av borgaravirksemi framd
- Umvegis Vaktætlanarskipanina verða allar vaktir lagdar hjá 1.000 starvfólkum, og skipanin hevur eitt budget modul, har tað er møguligt at framrokna
- Umvegis Gjaldsstovuna, er okkara játtan og okkara nýtsla. Gjaldsstovan er sinnað at lata upp til okkara BI skipan
- Umvegis Microsoft Dynamic, verður goymsluføring av hjálpartólum framd
- Umvegis Total View verður tímanýtsla og telefon avgreiðsla hjá 200 skrivstovufólkum framd

**4. Samstarvsfelagar Almannaverkið hevur**
Almannaverkið hevur í dag fleiri dugnaligar samstarvsfelagarar, sum vit ynskja at BI ráðgevi kemur at arbeiða saman við – umframt tey innanhýsis starvfólk á økinum.

- Klintra
- Gjaldsstovan
- Formula

Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn • Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

## 5. Sáttmáli og karmar

Ein sáttmáli verður gjørdur við eitt felag ella samtak, sum skal bjóða fram 1-3 ráðgeva/r.
Veitarin verður tímaløntur fyri sítt arbeiðið sambært tímaprísinum, ið veitarin bjóðar í sínum tilboði.
Teir ráðgevar, sum felagið ella samtakið, ið vinnur útboðið, setur á hesa uppgávu, skulu sum útgangsstøði ikki skiftast út. Vísir tað seg, at samstarvið við veitaran ella ávísar ráðgevar hjá veitaranum, ikki er nøktandi, tilskilar Almannaverkið sær rætt til at hava møguleika at skifta ráðgevarnar út.
Sáttmálatíðarskeiðið er 1 ár við møguleika fyri at leingja upp til 3 ár, um báðir partar vilja tað.
Veitarin ger útkast til ein sáttmála. Sáttmálin skal samsvara við krøvini ásett í hesum útboðstilfari.

## 6. Krøv til tilboðið

Tilboðið frá veitara skal fevna um:
CV hjá ráðgevunum við kunning um førleikar, útbúgving og royndir frá teimum seinastu 5 árini.  Í CV skulu líknandi avrik/tilvísingar við góðum úrsliti síggjast.
Tímaprísur/samsýning fyri veitingar fevnd av hesum tilboði, skal vera ein fastur, miðal tímatakstur.
Minstukrøv: Ráðgevarnir skulu í minsta lagi hava 2 ára skjalprógvaðar royndir.

## 7. Vekting av tilboði

Innkomnu tilboðini verða vektað eftir: góðska 50% og prísur 50%
Útrokningin fer fram á henda hátt:
Góðska: Førleikar, útbúgving og royndir hjá ráðgevum. Út frá eini samlaðari meting - út frá førleikum, útbúgving og royndum hjá teimum 1-3 ráðgevunum - verður eitt stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal. Vit gera vart við, at hetta er okkara kvalitativa meting av góðsku.
Tímaprísur: Tilboðið við lægsta samlaða tímaprísi fær 50 stig. Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli: Tilboð við lægsta tímaprísi/tímaprísur í tilboði, ið skal metast x 50
Lægsti tímaprísurin í frymlinum kann aldrin verða lægri enn 500 kr., t.e. at bjóðar ein veitari tímapris lægri enn 500 kr., verður tímaprísurin ásettur til 500 kr. í metingini.

Dømi um útrokning:
Góðska
Tilboð 1: Hesin veitarin skorar lægst, tí ráðgevararnir hava fáar og ikki so relevantar royndir og førleikar, hava ikki relevanta útbúgving, og tí veitarin hevur eina veika skipan. Hesin fær 20 stig.
Tilboð 2: Hesin veitarin skorar miðal, tí royndir, førleikar, útbúgving og skipan er á einum miðalgóðum stigi. Hesin fær 35 stig.
Tilboð 3: Hesin veitarin skorar hægst, tí ráðgevararnir hava tær bestu og drúgvastu royndirnar, førleikarnir, útbúgvingina og ta sterkastu skipanina. Hesin fær 50 stig.
Prísur
Tilboð 1: Tilboðið við lægsta miðaltímaprísi hjá veitaranum er 500 kr. Hetta gevur 50 stig.
Tilboð 2: Næstlægsta tilboðið er 650 kr. Hetta gevur 500/650 x 50 = 38,5 stig
Tilboð 3: Triðlægsta tilboðið er 800 kr. Hetta gevur 500/800 x 50 = 31,5 stig
Samlað meting
Tilboð 1: Førleikar 20 stig + miðaltímaprís 50 stig = samlað meting á 70 stig.
Tilboð 2: Førleikar 35 stig + miðaltímaprís 38,5 stig = samlað meting á 73,5 stig.
Tilboð 3: Førleikar 50 stig + miðaltímaprís 31,5 stig = samlað meting á 81,5 stig. Hesin veitarin gerst sostatt vinnari av útboðnum.

## 8. Innlating og tíðarætlan

Freistin hjá veitarum at seta spurningar um tilboðið er dagin innan tilboð skal verða inni. Spurningarnir skulu vera skrivligir og sendast til Høgna Olsen fíggjarstjóra, holsen@av.fo. Spurningar verða svaraðir leypandi. Almannaverkið kunnar hinar tilboðsveitararnar.

**Freistin at lata inn tilboð upp á veitingina er 31. mai 2023.** Tilboðið skal latast inn umvegis teldupost til Høgna Olsen holsen@av.fo Tilboð, ið verða móttikin eftir freistina, verða ikki viðgjørd.
Innan Almannaverkið tekur avgerð, kunnu vit bjóða tilboðsveitaranum inn á Almannaverkið at greiða nærri frá tilboðnum, um Almannaverkið metir hetta er neyðugt.